Kappingareftirlitið
FAROESE COMPETITION AUTHORITY

Advokatskrivstovan
Frúutrøð 4
Postboks 6
110 Tórshavn

**Att.: Niels Winther Poulsen, adv.**

**Tórshavn 14. november 2012**

Journal nr.: 12/00213-20
Viðgjørt: S.R.

**Avgerð um góðkenning eftir einfalda málsviðgerð**

## 1. Inngangur

Kappingareftirlitið fekk tann 9. oktober 2012 fráboðan, sbrt. § 16, stk. 1 í kappingarlógini. Í henni verður boðað frá, at P/f Poul Hansen yvirtekur tveir handlar frá Sp/f Svøðuni. Fráboðanin var fullfíggjað tann 9. oktober 2012.

P/f Poul Hansen keypir smápartapeningin í Sp/f Svøðuni, ið rekur Á-handilin v/Sundsvegin, og smápartapeningin í Sp/f INN Tórshavn, sum rekur Á-handilin v/Landavegin. Harumframt fevnir sølan um handilsbygning við Landavegin.

## 2. luttakandi fyritøkur

P/f Poul Hansen er størsta heilsøla í Føroyum mált uppá umsetning. Høvuðsvirksemið er heilsøluvirksemið innan kolonial, køli- og frystivørur.

P/f Poul Hansen hevur sett á stovn sølufelagsskapirnar Á og Samkeyp. Talan er um eitt samstarv, sum P/f Poul Hansen hevur við sjálvstøðugar keypmenn í Føroyum, um felags innkeyp, vørumerki og lýsingarátøk. P/f Poul Hansen eigur einsamalt rættin til Samkeyp-merkið, og Á-merkið saman við teimum luttakandi handlunum. Øll innkeyp og lýsingarátøk verða skipað av einari nevnd, har allir partar eru umboðaðir. Flestu sjálvstøðugir keypmenn luttaka í einum av hesum felagsskapum.

Tá ið sjálvstøðugir keypmenn luttaka í Á ella Samkeyp samstarvinum verða ávísar treytir settar, sum gera at bundinskapur er millum P/f Poul Hansen og hesar keypmenn. Treytir kunnu t.d. verða um, at handlarnir binda seg til, at avtaka allar vørur frá P/f Poul Hansen í sambandi við lýsingarátøk.

P/f Poul Hansen eigur dóttirfeløgini Sp/f Trio Import og P/f Vita margarin.

Á-handilin við Sundsvegin og Á-handilin við Landavegin reka handilsvirksemi innan kolonial, køli- og frystivørur. Harumframt selja handlarnir eisini búnýti av ymiskum slag. Handlarnir luttaka bæði í Á og Samkeyp felagsskapunum.

## 3. Marknaðir

Tá ið metast skal um avleiðingarnar av eini yvirtøku, verður í fyrsta lagi hugt eftir hvussu marknaðarstøðan er aftaná yvirtøkan er framd. Fyrsta stig í hesi meting er at skilmarka viðkomandi

marknað og síðani verður hugt at marknaðarpørtunum á viðkomandi marknaði. Skilmarkingin av viðkomandi marknaði fer fram sambært § 5 í kappingarlógini.

Á viðkomandi marknaði eru allar tær vørur og tænastur, sum brúkarin metir kunnu varasetast (substitión) við hvørja aðra orsakað av eginleikunum, prísum og nýtsluendamáli. Tá metingar verða gjørdar um viðkomandi vørumarknað, er av týdningi at greina, hví ávísar vørur eru partar av viðkomandi marknaði, og hví aðrar ikki eru tað. Hetta verður gjørt við m.a. at hyggja at, í hvønn mun vørur kunnu varasetast, hvussu kappingarfyritreytirnar eru, prísirnir, krossprísełasisitetur á eftirspurninginum og onnur viðurskifti sum kunnu hava týdning (t.d. útboðsvarseting). Viðkomandi marknaður er landafrøðiliga skilmarknaður til eitt øki, har luttakandi fyritøkurnar selja ella keypa vørur og tænastur, sum hava so mikið eins kappingarumstøður, og sum kunnu skiljast frá grannaøkjum, av tí at kappingarumstøðurnar har eru munandi øðrvísi.

### 3.1. Viðkomandi marknaður

Viðkomandi marknaður er marknaðurin fyri húsarhaldsvørur í Tórshavn. Skilmarkingin av hesum marknaði má gerast í mun til tað samlaða úrvalið hjá keyptu handlunum. Hesir selja matvørur, búnýti og aðrar vørur til húsarhaldi.

Fráboðari metir, at bensinstøðirnar hjá Magn og Effo eru partar av viðkomandi marknaði. Kappingareftirlitið er ikki samt í hesi áskoðan, tí bensinstøðirnar hava ikki líka breitt vøruúrval. Bensinstøðirnar selja t.d. ikki búnýti. Tá tað kemur til matvørur er tað neyvan rætt at sammeta bensinstøðirnar við Inn-handlarnir. Her er prísstøðið ov høgt og vøruúrvalið ov lítið til, at bensinstøðirnar kunnu metast at vera eitt alternativ.

Kappingareftirlitið metir tí, at á viðkomandi marknaði eru Miklagraður, Bónus, Mylnurnar, Samkeyps- og Á-handlar, Føroya Keypssamtøka og aðrir møguligir handlar, sum hava eitt breitt úrval av húsarhaldsvørum. Sostatt er føroyski heilsølumarknaðurin fyri húsarhaldsvørur eyðkendur við at allir veitarar eru partar av einhvørjum sølusamstarvi.

Sambært teimum upplýsingum sum Kappingareftirlitið hevur, kemur P/f Poul Hansen at sita á minni enn 10% av viðkomandi marknaði.

### 3.2. Atknýttir marknaðir

Heilsølumarknaðurin fyri húsarhaldsvørur í Føroyum er atknýttur marknaður til viðkomandi marknað. Talan er um marknað, sum er vertikalt bundin til viðkomandi marknað, og tí kann kappingarstøðan á hesum marknað vera viðkomandi. Serliga tí at keyparin, P/f Poul Hansen, hevur sítt høvuðsvirksemi á hesum marknaði.

P/f Poul Hansen er størsti veitari á hesum marknaði, men talan er um marknað, ið hevur fleiri og ymiskar veitarar. Tað eru fýra heilsølur, sum eins og P/f Poul Hansen, hava eitt breitt úrval av vørum. Síðani eru fleiri smærri heilsølur, sum veita eitt avmarkað úrval av húsarhaldsvørum.

Afturat áðurnevndu heilsølum skal nevnast, at størstu samtøkurnar í Føroyum innflyta vørur beinleiðis frá donskum veitarum. Bæði Miklagarður(íroknað Mylnurnar) og Føroya Keypssamtøka innflyta meginpartin av teirra søluvørum beinleiðis frá donskum veitarum.

## 4. Meting

Metingarstøðið hjá Kappingareftirlitinum fyri nær ein yvirtøka skal góðkennast ella forbjóðast er í §15, stk. 2 í kappingarlógini. Ásetingin sigur, at um ein yvirtøka ikki munandi forðar fyri virknari

kapping, serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu, skal hon góðkennast. Er hinvegin talan um, at yvirtøkan fer munandi at forða fyri virknari kapping skal hon forbjóðast.

Tá metast skal um ein yvirtøka kann forða fyri virknari kapping, skal atlit takast til marknaðarpartin, men hesin kann ikki standa aleinaður í eini meting. Við seinastu lógarbroytingini[1] var SIEC-testin innførd í føroysku kappingarlógina. Henda testin letur upp fyri, at sjálvt um ein ráðandi marknaðarstøða hvørki verður skapt ella styrkt, kann niðurstøðan framvegis verða, at virkna kappingin verður forðað, og tá skal yvirtøkan forbjóðast. Hetta kann t.d. verða støðan, tá ið ein yvirtøka førir til ein oligopol-bygnað á marknaðinum, og vandi er fyri sínámillum bundinskap millum eftirverandi fyritøkur.

Yvirtøkan hevur við sær, at P/f Poul Hansen kemur at sita á einum marknaðarparti, sum er minni enn 10% av marknaðinum. Ein marknaðarpartur á hesi støðd skapar í sær sjálvum ongi kappingarlig ivamál. Tað ivamál sum Kappingareftirlitið hevur viðvíkjandi hesi yvirtøka, er hvørt loddrætta sameiningin[2] saman við yvirtøkuni, kann gerast ein kappingarligur trupulleiki. Vandamálið við loddrættari sameining er, at aðrir veitarar kunnu útihýsast frá viðkomandi marknaði.

Loddrætta sameiningin sum yvirtøkan hevur við sær, skal haldast upp ímóti tí verandi sølusamstarvi, sum P/f Poul Hansen hevur við flestu sjálvstøðugu keypmenninar í Føroyum. Tí P/f Poul Hansen hevur longu ávísa ávirkan á teimum keypmonnum, sum luttaka í sølufelagsskapunum. Eitt nú binda hesir seg til at keypa ávísar vørur frá P/f Poul Hansen. Sambært upplýsingum frá fráboðara stavar bróðurparturin av søluni hjá P/f Poul Hansen frá sølu til keypmenn í sølufelagsskapunum. Sum áður nevnt eigur P/f Poul Hansen rættin til Samkeyp – merkið og eigur rættin til Á-merkið, saman við luttakandi handlunum. Fyri handlarnir í samstarvinum vildi tað verið ein torfør uppgáva at skapt egið handilsmerki, og fingið til vega nøktandi tilboð.

Talan er tó ikki um treytaleysan bundinskap millum P/f Poul Hansen og sjálvstøðugu keypmenninar. P/f Poul Hansen er eisini bundin at teimum sjálvstøðugu keypmonnunum. Meginparturin av søluni hjá P/f Poul Hansen er til hesar keypmenn. Tískil er talan um avtalupartar, sum hava brúk fyri hvørjum øðrum.

Í fyrstu atløgu kann sigast, at sølusamstarvi millum PH og sjálvstøðugu handlarnir avmarkar kappingina. Tí talan er um samstarv, sum hevur við sær at handlarnir føra somu tilboð og hava í stóran mun sama úrval. Sostatt hevur samstarvið millum P/f Poul Hansen og sjálvstøðugu handlarnir ein samskipandi virkna.

Verður rákið í Føroyum samanborið við tað í grannalondum okkara, síggjast líkheitir í gongdini. Eins og í okkara grannalondum, hevur føroyski lokali keypmaðurin havt torført við at kappast við størri vøruhús og lágpríshandlar. Fyri hann hevur loysnin verið, at innganga í samstarv við aðrar keypmenn í somu støðu. Hesi samstørv geva lokala keypmanninum møguleika at varðveita eitt ávíst frælsi yvir sínari fyritøku, og møguleikanum fyri at samstarva um tær uppgávur, sum hann ikki megnar aleinaður. Til dømis innkeyp og lýsingarátøk.

Sæð í hesum ljósi styrkja Á og Samkeyp heldur um kappingina, við tað at sjálvstøðugir keypmenn í Føroyum hava møguleika at lýsa við tilboðum, sum eru kappingarfør við tey tilboð sum Miklagarður, Bónus og Føroya Keypssamtøka hava.

[1] Løgtingslóg nr. 35 frá 27. apríl 2012 um broyting í løgtingslóg um kapping.
[2] Horisontal integrering

til, at virknað kappingin verður munandi forðað. Vísast kann á, at tað eru fyritøkur á viðkomandi marknaði sum hava størri marknaðarpart og sum ikki eru bundnar av P/f Poul Hansen á atknýtta marknaðinum.

**5. Niðurstøða**

Grundað á teir upplýsingar sum Kappingareftirlitið hevur, verður ikki mett, at fráboðaða yvirtøkan vil forða fyri virknari kapping, serliga við tað at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkt. Kappingareftirlitið hevur tí avgjørt at góðkenna yvirtøkuna, sbrt. §15, stk. 2, 1. pkt. í kappingarlógini.

Vegna

Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson

Deildarstjóri

Sigurd Rasmussen

Fulltrúi